# Lærarastørv og størv sum stuðul

## í Norðskála-Oyrar skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar:**

- 3 lærarar í fast starv frá 1. august 2007
- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar
- 1 starv sum stuðul 30t/v

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Skúlanum tørvar fólk til:**

- Skúlabyrjan við serligum atliti at byrjunarlesing
- Innskúlin, so skiftið frá barnagarði til skúla er í góðum hondum
- Undirvísing í sangi og tónleiki
- Skúlabyrjan við serligum atliti at rokning
- Rokning við eldru flokkunum
- Toymisarbeiði
- Frálæru í ítrótti og svimjing
- Frálæru í leiki

**Førleikakrøv:**

Tey, ið verða sett í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**

Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2007.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera 1.læraranum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 20. juni kl. 10**

Setanarsamrøður verða í døgunum 21. og 22. juni.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla Jákup Joensen, 1. lærara, á tlf. 442245 ella 771035. Eisini ber til at senda teldupost til 1. læraran: oli.jakup.joensen@skulin.fo

NORÐSKÁLA-OYRAR SKÚLI
Postboks 39 · FO-400 Oyrarbakki
Tlf. 442245 / 422275 og 771035

**Norðskála-Oyrar skúli** hevur komandi skúlaár umleið 70 næmingar í 5 flokkum. Við skúlan fara at starvast 8 lærarar, 1 stuðlul, og reingerðingarfólk.

Komandi skúlaár fer skúlin at arbeiða við at seta í verk fleiri menningarætlanir.

Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: skular.sunda.fo

SERNÁMSDEPILIN





# Brót upp úr nýggjum

Trý spennandi fulltíðarstørv í Suðuroy til nýggja skipan innan sernámsfrøði

Nýskapan og menning eru neyðug innan sernámsfrøðiliga økið. Tað hava Mentamálaráðið, Sernámsdepilin og kommunurnar í Suðuroy ásannað og hava tí valt at seta á stovn eina nýggja skipan innan sernámsfrøði.

Søkt verður eftir 3 framfýsnum starvsfólkum til at manna eitt gott toymi saman við serlærarunum í økinum í einari sernámsfrøðiligari eind í Suðuroy, sum verður stovnsett 1. august 2007 ella skjótast til ber eftir hetta. Tænastueindin virkar sum sjálvstøðug eind undir Sernámsdeplinum.

**Størvini**

Tú gert tær hugsanir um, hvussu sernámsfrøðin kann mennast og samskipast. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstundis hava hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og at samstarva við aðrar fakbólkar.

**1. Samskipari**

Tú hevur útbúgving sum lærari og hevur arbeiðsroyndir. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur leiðsluroyndir og viðkomandi eftirútbúgving. Arbeiðsuppgávurnar vera m.a. at leiða og fordeila arbeiðið í tænastueindini og vera tann, sum er andlitið úteftir.

**2. Sálarfrøðingur**

Tú hevur útbúgving sum sálarfrøðingur. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur arbeitt við børnum. Arbeiðsuppgávurnar vera m.a. at kanna børn í økinum og vera við til at samskipa og ráðgeva í sambandi við tiltøk kring børn við serligum tørvi.

**3. Skrivstovufólk**

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur skrivstovuútbúgving og arbeiðsroyndir. Arbeiðsøkið er m.a. vanligt skrivstovuhald, skráseting og skrivarauppgávur.

**Setanarviðurskifti**

Størvini verða sett sum skjótast. Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært galdandi sáttmála við avvarðandi fakfeløg. Samskiparin verður settur í Sernámsdeplinum við fyribils tænastu í Suðuroy. Sálarfrøðistarvið verður skipað í samstarvi ímillum Sernámsdepilin, Barnaverndartænastuna og sálarfrøðingin, ið settur verður. Skrivstovufólkið verður sett í Vágs Kommunu vegna kommunurnar í Suðuroy.

**Umsókn**

Umsóknir við neyðugum prógvum og viðmælum skulu í seinasta lagi 13. juli 2007 sendast til:
Sernámsdepilin, Frælsið 32,
110 Tórshavn

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra í Sernámsdeplinum, tlf. 314522, t-postadr. hanseli@snd.fo, ella til Janus Jensen, undirvísingarleiðara í Mentamálaráðnum, tlf. 355050, t-post janus@mmr.fo

**NSR-tænastan** (námsfrøðiliga-sálarfrøðiliga ráðgevingin) fer at liggja í Vági, men arbeiðsøkið er øll Suðuroy.

NSR-tænastan

- samskipar serundirvísing og ráðgeving millum skúlar, stovnar, myndugleikar og foreldur í økinum
- veitir kommunum ráðgeving í sernámsfrøðiligum spurningum
- skipar fyri skeiðum til starvsfólk og foreldur
- skipar heildartilboð til næmingin við serligum tørvi. Tænastueindin
- hevur samstarv við barnaverndarstovur, heilsusystrar og sosialar deildir

sansir.fo

## Handilsútgerð til sølu

Millum annað tráðhillar og tráðkurvar, sum kunnu stáplast.

**Tel 443080 ella 743080**

almannastovan

# HÚS ELLA ÍBÚÐ

Fyri eitt av starvsfólkum okkara verður sóknast eftir húsum ella íbúð til 1. august 2007.

**ALMANNASTOVAN**

Postboks 3096 · 110 Tórshavn